## HEILSANIR



**Góði fitti Hallur**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum í dag. Jesus pápi signi framtíð tína. Eg elski teg góði.
**Ynskir omma í Skálabotni**



**Góða elskaða Kristina**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum 7. sept.
**Ynskja Johannes, babba og mamma**



**Góði lítli Hallur**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 5. sept.
**Bestu heilsanir frá abba í Oyndarfirði**



**Góði Rúni**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 5/9. Vit leingjast illa eftir tær.
**Heilsan omma, abbi, bubbi og John**



Eg og foreldur míni takka øllum tykkum, ið gleddu meg á Konfirmatiónsdegnum 22/4.
**Heilsan Eyðstein Joensen**



**Góði Sveinur**
Vit øll ynskja tær hjartaliga tillukku á 7 ára føðingardegnum.
**Muss og klemm frá mammu**



**Góða Durita, Birita og Heðin.**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 7/9 og 16/9. Jesus pápi signi tykkum.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði allarbesti Rúni**
Tillukku á 4 ára føðingardegnum 5/9.
**Heilsan Mostir og Agga**
P.S. Vit gleða okkum nógv til tú kemur aftur.



**Góði Jan gubbi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 7. sept. ynskja vit tær.
**Ári, Martin og Petur Ovi**



**Góði Eyðstein!**
Hjartaliga tillukku á 14 ára degnum.
**Ynskja mamma, babba, Kaj, Magnhild og Eirikur.**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**



## HEILSANIR



**Góðu Vár og Lív**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardøgunum. Eisini ein heilsan til Nannommu.
**Ynskja mamma, babba, Trygvi og Jørgin**



**Góði fitti Hallur**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 2 ára degnum. Alt tað besta framyvir. Vit elska teg.
**Bestur heilsanir frá mammu, babba og Martu**



**Góði Rúni**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 5/9.
**Heilsan mamma, babba og Mary**



**Góða lítla fitta Monika**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Nú ert tú blivin ein stór didda.
**Heilsan Je**



**Góða Monika!!**
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum. Nú helt tú, at eg hevði gloymt tað. Men sum mann sigur, betur seint enn ongantíð.
**Angelina**



**Góða Marita**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum.
**Ynskja mamma og pápi**



**Allarbesta mostir**
Tillukku við 25 ára føðingardegnum. Takk fyri, at tú ert so góð við okkum.
**Heilsan Sandra og Fríði**
P.S. Hvar ert tú nú???



**Góði fitti Hallur**
Eg ynski tær hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Her ert tú so cool góði.
**Heilsan Evi gumma**



**Til Ingmar**
Á 25 ára starvsdegnum ynskja vit góðan arbeiðshug framyvir.
**Heilsan mamma og pápi**

## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 8*

tá ið viðkomandi fer at arbeiða, men tað merkir ikki, at viðkomandi ikki kann arbeiða, tvs., at vit fáa eina rúgvu av fólki út at virka sum zoneterapeutar, men nú skal tað sjálvandi ikki virka, sum at tú – at eg tvingi teg til at leggja eftir nøkrum, men liggur ikki ein vandi í fyri brúkaran, at viðkomamdi ikki hava nóg góða útbúgving?

Jú, og tí vil eg til tykkum í Føroyum, sum kundu hugsað tykkum zoneterapiviðgerð: Hyggið eftir og spyrjið um, um viðkomandi er viðurkendur av FDZ!! Tí teir zonneterapeutar, sum lúka hesi minnimum krøv í Føroyum, ein í Suðuroy, 3 í Havn, Petra og Ragnhild, og tær lúka allar treytirnar hjá FDZ! Og tað er ein viss trygd fyri brúkaran, at viðkomandi ER veruligur zoneterapeutur.

Og tað er virkuliga synd fyri hesi fólkini, sum ganga á henda skúlan og halda, at tey fáa fullfíggjaða útbúgving, og so vísir tað seg, tá ið saman um kemur, at tað er tað ikki.

Tú, haldi eg, brúkti myndina, tá ið tú fórt í ein hýruvogn, tá setti tú eitt krav.

Ja, og tað er tað minsta kravið, eg seti til ein hýruv.før., tað er, at hann hevur eitt koyrikort – og at ein skipari hevur pappírir, sjálvt um, at tað ikki sigur mær so nógv, um eg hugdi at skiparapappírunum, men tað svarar til at koyra í einum bili, ja, við ongum skili … ja, eg veit ikki, hvussu, man skal siga.

M.a. varð soleiðis tikið til í sending í »Rás 2« hin 16. mai í ár. Skúlin, talan er um, er Vestegnens Zoneterapiskole, og næmingarnir, ið fingu prógv sum zoneterapeutar nakað eftir, at henda sending var at hoyra, eru teir, ið fóru undir útbúgving fyri seinasta heyst.

Í sendingini verður Vestegnens Zoneterapiskole sagdur at nytta lítið og einki, og eftir tí er lætt at skilja, at næmingarnir, hann letur fáa prógv sum zoneterapeutar, kunna illa eiga álit hjá nøkrum, ið hevur hoyrt áðurnevndu sending.

Sjálvandi var tað av áhuga, farið varð undir útbúgving í fjør. Og tá ið skúlin lýkur øll krøv, hvat útbúgvingini víðvíkur, var einki ivamál í so máta, og tað varð gjørt greitt alt fyri eitt.

Skúlagongdin var strævin, men hon var samstundis spennandi, og at undirvísingin var dygg og gagnlig, sást við hálvum eyga. Tí fingu øll prógv – men hetta prógv ger »RÁS 2« í sendingini 16. mai í ár til einkis, og har fer »RÁS 2« út um mark.

Skúlin hevur mong ár á baki, og krøvini, ið sett verða slíkum skúla, lýkur hann øll. Næmingar hansara standa ikki eitt petti aftan fyri teir, ið fáa prógv frá øðrum skúlum av sama slagi.

Men áðurnevnda sending gjørdi almikið fortreð.

1) Ein, sum leigar ein hýruvogn, má kunna krevja, at førarin hevur koyrikort og

2) Av einum, ið siglir sum skipari, má kunna krevjast, at hann hevur síni skiparapappír í ordan og

3) Og tað er virkuliga synd fyri hesi fólkini, sum ganga á henda skúlan og halda, at tey fáa fullfíggjaða útbúgving, og so vísir tað seg, tá ið saman um kemur, at tað er tað ikki.

Stórt spell, at fólk loyvir sær at bera slík ósannindi, tí tey gera mikið ógagn.

Vit ikki bara mótmæla, men mótmæla harðliga!

OG! Ikki meiri frá okkara síðu um hetta mál.

Men tað liggur á ljóði, at Vestegnens Zoneterapiskole hevur stevnt. Og tað er ikki at undrast á.

**Leona Ellefsen**
**Ebba Jacobsen**
**Eyðbjørg Jacobsen**
**Marin Joensen**
**Joan Poulsen**
**Anna Olsen**
**Frida Samuelsen**
**Helena Viderø Olsen**
**Tove Simonsen**
**Allan Dahl Kristensen**
**Lis í Selvindi**
**Inga Símunardóttir**